Bogi og Rói føroyameistarar fyri pør

20 pør spældu við í finaluni í FM kappingini fyri pør leygardagin 20. apríl. Spælt var í Bridgehúsinum í Havn. Spæld vóru 57 spøl, og vinnarar gjørdust Bogi Simonsen og Rói á Rógvu Joensen.

BRIDGE
Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen

Bogi Simonsen og Rógvi á Rógvu Joensen gjørdust føroyameistarar

Hetta er fyrstu ferð, at teir báðir vinna FM kappingina fyri pør saman sum par, men teir hava báðir vunnið fyrr saman við øðrum makkarum. Bogi hevur vunnið tvær ferðir áður. Í 1999 vann hann saman við Arna Mikkelsen og í fjør saman við Niels Nielsen. Rói var føroyameistari 2000 saman við Heðini Mouritsen. Rói og Bogi hava í vetur spælt í Bridgedeild Kaggans.

Tá avtornaði lógu teir nógv fremstir, men undan teimum seinastu umførunum var stórur spenningur millum trý pør. Hini pørini, sum talaðu við um meistaraskapið vóru Hallberg Arnfríðsson – Kaj Alstrup og Petur Annfinn Johannesen – Eilif Petersen. At Hallberg og Kaj kláraðu seg so væl kann vekja eitt sindur av undran. Teir eru júst byrjaðir at spæla saman í vetur, men hava saman fingið góð úrslit í Havnar Bridgefelag. Eitt spennandi par, sum kann koma langt.

Petur Annfinn og Eilif hava spælt saman í nógv ár og hava eisini javnan ligið frammarlaga í kappingum. Teir spæla dagliga í Bridgedeild Kaggans.

FM finala fyri pør 2001-02

20.04.02
20 borð, 57 spøl, miðal: 0

1	Bogi Simonsen – Rói á Rógvu Joensen	121
2	Hallberg Arnfríðsson – Kaj Alstrup	85
3	Petur Annfinn Johannesen – Eilif Petersen	76
4	Carl Mikkelsen – Egil Helmsdal	53
5	Per Kallsberg – Dánjal Pauli Mohr	29
6	Magni Jøkladal – Árant Berjastein	28
7	Niels Nielsen – Bjarki Johannesen	25
8	Símin Lassaberg – Árni M. Dam	19
9	Heðin Mouritsen – Jóannes Mouritsen	10
10	Jens Pauli G. Nolsøe – Høgni Hansen	9
11	Marjun Restorff – Arnleyg Mikkelsen	-8
12	Eyðun Jakobsen – Øssur Winthereig	-14
13	Robert Langgaard – Eyðun Anthoniussen	-18
14	Marner Joensen – Dia Jacobsen	-29
15	Jógvan Ranghamar – Atli Hansen	-48
16	Gunnar Mouritsen – Fríðrik Heinesen	-50
17	Hanus Bærentsen – Steingrímur Weihe	-55
18	Arnbjørn Sivertsen – Hans Jacob Petersen	-67
19	Helgi Joensen – Eyðun Joensen	-75
20	Pól Joensen – Børge Egholm	-83

Hallberg Arnfríðsson og Kaj Alstrup vóru væl við í kappingini um føroyameistaraskapið

Petur Annfinn Johannesen og Eilif Petersen kláraðu seg eisini væl hóðast bert hava spælt saman síðan í vetur

Vit skulu síggja eitt spæl frá vinnarahond.

Nr B24
V/-

_ AK1042
_ 9543
_ 7
_ K97

_ 9865
_ K
_ K9862
_ 1086

_ QJ3
_ 87
_ J1053
_ A542

_ 7
_ AQJ1062
_ AQ4
_ QJ3

V	N	E	S
Arnbjørn Sivertsen	Bogi Simonsen	Hans J. Petersen	Rói á Rógvu Joensen
p	p	p	1hj
p	4ru	p	4hj
p	p	p	

4rú hjá Norðan er eitt sokallað Splinter meld. Hetta lovar hjartara við og singleton í rútara – styrkin er til útgang. Tað kann vera freistandi hjá Sunnan at melda slemm, men Rói valdi at halda seg í skinninum. Teir meldaðu ikki slemm, og tað eigur man heldur ikki, tá tvey av lyklakortunum mangla (klA og hjK). Við nøkur av borðunum komu NS í 6hj, men tey flestu meldaðu bara útgang. Øll, sum meldaðu slemm, fóru niður, tí tey klíptu hjartaran, og mótspælið tók fyri klA.

Arnbjørn var ikki heppin við útspælinum. Hann spældi sp9 út, Rói tók við konginum og spældi hjartara til essið! Kongurin fall, og Rói tók tann seinasta trumfin, tók rúA, spældi rútara til trumf, lítlan spaðara til trumf, enn ein rútara til trumf, og tá hann nú tók spA, fall spQ, og Rói kundi kasta allar tríggjar kleyvararnar á hondini uppá spaðaran. 13 stikk og ein reinan topp til Róa og Boga. Til lukku við FM heitinum tit báðir!

FM kappingin fyri lið

Finalu umførini í FM kappingini fyri lið verða leikt komandi vikuskifti. Eftir skránni skuldi tað leikast í Klaksvík, men skal nú m.a. orsakað av verkfallinum leikast í Bridgehúsinum í Havn. Byrjað verður í fríggjakvøldið kl. 19.30, og hildið verður fram leygardagin kl 10.00.

Marathon í Havn

RENNING
Stefan í Skorini

Komandi leygardag tann 4. mai klokkan 13 skipar Bragdið fyri FM í marathon í Havn.

Byrjað verður á leiðini við Bursatanga, og runnið verður eftir slættari leið niðri við kajøkið og úti við Strond.

Bragdið boðar frá, at øll eru vælkomin ung sum gomul. Aldursmarkið er tó 16 ár.

Tey, ið hava hug at royna seg í marathon, kunnu boða frá luttøku á kajøkinum ein tímar áðrenn startskotið.

Vinnarin kunngjørdur í komandi blað

KAPPING
Stefan í Skorini

Vegna verkfallið hjá Skippara- og Navigatørfelagnum hevur Sosialurin valt at útseta lutakastið í kappingini um eina ferð til dystin millum FCK og Brøndby.

Verkfallið hevur havt við sær, at posturin hevur verið nógv seinkaður. Tí eru fleiri brøv til kappingina komin blaðnum í hendi ov seint. Hetta verður tikið eftirtektar.

Ætlanin var, at vinnarin skuldi kunngerast í blaðnum 27. apríl, men hetta verður ístaðin kunngjørt í hósdagsblaðnum.

zarepta

Tekningarseðil til familjulegurnar.

Um Gud vil, er ætlanin aftur í ár at hava familjulegur í Zarepta í Vatnsoyrum.

Av tí at pláss bert er fyri 25 familjum á hvørju legu, er møguleikin at hava tvey ynski á tekningarseðilinum.

Eru ivaspurningar, ber til at ringja til Ragnfríð Kannuberg, tlf. 286140

Fyllið seðlin út sum skjótast, og tit frætta aftur í góðari tíð.

Tekningarseðilin skal sendast til:
Ragnfríð Kannuberg, Postboks 201, 600 Saltangará

	Familjulegur 2002	Ynski 1	Ynski2
Familjulega I	Leyg. 25.05 - fríg. 31.05		
Familjulega II	Leyg. 01.06 - fríg. 07.06		
Familjulega III	Leyg. 08.06 - fríg. 14.06		
Familjulega IV	Leyg. 15.06 - fríg. 21.06		
Familjulega V	Leyg. 18.08 - fríg. 24.08		

Navn/nøvn á foreldrum:

Tlf.: Gøta: Bygd/býur:

Navn og aldur á børnum:

Viðmerkingar:

Skeið

Samtalan sum lei sluamboð

Tær truplu samtalur - Leiðarin sum leiðbeinari

Endamálið við skeiðinum er at styrkja um førleikan hjá luttakarunum at brúka samtaluna sum professionelt amboð í ymiskum truplum støðum. Talan kann t.d. vera um, at okkurt avrik er ov vánaligt arbeiðsliga, at siga nei til umsóknir um starv, nógvir sjúkradagar, alkoholtrupulleikar, uppsagnir o.a.

Á skeiðinum verður arbeitt við framløgum, samtalum og praktiskum venjingum, ið innihalda videoupptøkur.

Skeiðið vendir sær til stjórar og leiðarar við starvsfólkaábyrgd.

Skeiðsleiðarar eru vinnulívssálarfrøðingarnir
Nikolaj Lunøe og Jan Willemoes.

Skeiðið er á føroyskum og á donskum.

Skeiðið verður hildið 19.-21. juni á Hotel Vágum sum internatskeið.

Skeiðið er evnað til 12 luttakarar.

Skeiðsleiðslan skilar sær rætt til sjálv at seta skeiðsluttakarbólkin saman,

Kostnaður fyri skeiðið er 7.500,00 kr. við øllum

Tilmelding fram til mánadagin 27. mai á telduposti: wille@post.olivant.fo
Svar verða send luttakarunum í viku 23 saman við endaligu skránni, profilum og luttakaralista.
Ynskja tygum at vita meira um skeiðið ringi til Jan Willemoes á tlf.: 21 15 09

WILLEMOES PROCONSULT

Lýsið
við
brúktum
bilum

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Útbjóðing

Nýggj kommunuskrivstova í Sumba

Fyri Sumbiar kommunu, verður arbeiðið at umvæla og umbyggja verandi bygning til nýggja kommunuskrivstovu, hervið boðið út alment í **høvuðsarbeiðstøku**:

1. Jørð-, kloakk- og betongarbeiði
2. Timburarbeiði
3. Múraraarbeiði
4. Málaraarbeiði
5. HVS-arbeiði
6. El-arbeiði

Arbeiðið skal gerast í tíðarskeiðnum juni til september.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Landsbyggifelagið í seinasta lagi týsdagin 7. mai.

Tilboð í afturlatnum brævbjálva merktur »Nýggj kommunuskrivstova í Sumba« skulu vera Landsbyggifelagnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. juni 2002 kl. 15.00.

Lisitatiónin verður á skrivstovu okkara 3. juni kl. 15.00.

Landsbyggifelagið P/F
Postboks 228
Grønlandsvegur 5
FO-110 Tórshavn